# Lofta fólki sum koma illa fyri

**Fólk, sum koma illa fyri av skaða ella sjúku í sambandi við arbeiði, skulu nú hava munandi betri sømdir. Men ein betri skipan kostar og tað fer eisini at verða munandi dýrari hjá arbeiðsgevarum og sjálvstøðugt vinnurekandi**



*Nógv av teimum, sum nú detta niðurímillum, tá ið tey fáa skaða í arbeiði, ella verða sjúk av arbeiði, verða loftað av eini nýggjari skipan, sum nú skal setast í verk. Samstundis hækka endurgjaldini munandi*

ARBEIÐSSKAÐATRYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu øll, sum fáa arbeiðsskaðar, ella verða sjúk av arbeiðnum, fáa munandi betri sømdir

Eitt tað fyrsta, sum løgtingið sleppur at taka støðu til eftir jólaferiuna, er eitt uppskot til eina nýggja arbeiðsskaðatrygging, sum skal koma ístaðin fyri tað ótíðarhóskandi og ófullfíggjaðu vanlukkutryggingina, sum nú er í gildi.

Vanlukkutryggingin, sum nú er í gildi, er ógvuliga avmarkað og tí eru tað heilt nógv fólk, sum detta burturímillum og onga hjálp fáa, tá ið tey koma til skaða í sambandi við arbeiði, ella tá ið tey verða sjúk av arbeiðnum, tey hava.

Men síðani Hans Pauli Strøm varð landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, hevur hann lagt nógva orku í at gera eina nýggja skipan, sum skal lofta nógv fleiri av teimum, sum koma illa fyri í sambandi við arbeiðið enn vanlukkutryggingin nú ger. Annars hava politikarar í rættiliga nógv ár tosað fáa eina betri vanlukkutrygging.

Enn hevur tað ikki eydnast, men Hans Pauli Strøm vónar, at tað eydnast hesuferð, nú uppskot verður lagt fyri tingið so skjótt tað kemur saman aftur síðst í januar.

### Ótíðarhóskandi og ófullfíggjað

– Lógin, sum er í gildi nú, er ótíðarhóskandi og ófullfíggjað, tí tað eru ógvuliga nógv sløg av skaðum, sum onki endurgjald fæst fyri.

Umframt at vera eitt rættiligt frambrot á hesum øki, fer nýggja lógin eisini at lyfta føroyingar koma upp á sama støði á hesum øki sum hini norðurlondini eru á.

– Vit hava eina beinleiðis skyldu til at lyfta okkum upp á norðurlendskt støði á hesum øki, tí í ymsum sáttmálum, vit norðurlond hava gjørt sínamillum um sosiala trygd, hava tey bundið seg til at veita borgarum hjá hvørjum øðrum somu sømdir, men tey krøvini ganga vit ikki á møti í løtuni.

Hans Pauli Strøm sigur, at størsta framstigið í nýggju lógini er, at hon kemur eisini at umfata vinnusjúkur og brádliga íkomnir lyftiskaðar.

– Hesi sløgini av skaðum og sjúkum eru ikki umfatað av lógini, sum er, og tí verður heldur onki endurgjald latið fyri slíkar skaðar og sjúkur, sum hava sambandi við arbeiðið

Landsstýrismaðurin sigur, at hetta ljóðar kanska ikki av so nógvum.

– Hugtakið vinnusjúkur fevna um vanlukkur í sambandi við arbeiði. Men hugtakið fevnir eisini um tær sjúkur, ið fólk kunnu fáa av av arbeiðnum, tey hava.

Landsstýrismaðurin sigur, at í sambandi við vinnusjúkur fáa tey nú eisini rætt til trygging, sum verða sjúk av arbeiði, hóast sjúkan ikki vísir seg, fyrrenn ein tíð er fráliðin.

Hesi fólkini hava ikki rætt til endurgjald, sum støðan er nú.

Lyftiskaðar eru kanska mest kendir í heilsuverkinum, har heimahjálpir, sjúkrasystrar og portørar eru í stórum vanda fyri at fáa lyftiskaðar, men tað eru sjálvsagt eisini onnur við tungum arbeiði, sum eru í vanda fyri at fáa lyftiskaðar.

Hesar lógarbroytingarnar ljóða kanska ikki av so nógvum, men Hans Pauli Strøm sigur, at týdningurin av teimum skulu ikki undirmetast.

### Nógv fleiri fáa endurgjald

Lógin, vit hava, er frá 1966 og tað eru eitt ørgrynni av skaðum og sjúkum, sum onnur norðurlond nú hava viðurkent sum vinnuskaðar og vinnusjúkur, sum vit als ikki kendu til miðskeiðis í sekstiárunum.

– Vit meta, at bara tað, at hesi bæði hugtøkini verða tikin við í nýggju lógina, fer at víðka hetta økið meiri enn ein triðing.

– Tað eru so nógv fólk, sum fáa lyftiskaðar ella fáa sjúkur, sum stava frá arbeiðnum, at vit meta, at meiri enn triðingur av teimum, sum nú fara at fáa rætt til endurgjald frá tryggingini, fáa tað av hesum orsøkum.

Samstundis, sum tann nýggja lógin fevnir um nógv fleiri sløg av skaðum og sjúkum, verða eisini útgjaldini, sum fólk koma at fáa frá tryggingini, tá ið tey koma illa fyri, munandi hægri enn tey eru nú.

### Ein kravd trygging

Hans Pauli Strøm leggur dent á, at talan er um eina tryggingarskipan, har allir arbeiðsgevarar skulu hava síni starvsfólk tryggjað. Men hetta er eisini ein skipan, sum øll sjálvstøðug vinnurekandi skulu vera í. Sostatt kemur lógin at umfata øll, bæði løntakarar og tey vinnurekandi.

Og av tí at tað verða so stórar ábøtur verða gjørd á lógina, fer tað eisini at vera nógv dýrari at betala til hesar tryggingar.

– Vit meta, at tað fer at vera upp ímóti 40% dýrari hjá einum arbeiðsgevara at vera í nýggju arbeiðsskaðatryggingini, enn tað er at vera í vanlukkutryggingini, sum nú er.

Fyri at gera umsitingina skjótari og einfaldfari, skal øll skipanin hereftir savnast og umsitast á Almannastovuni.

## Suðuroyingar fingið leiðara

**Eisini barnaverndarumsitingin í Suðuroy hevur nú fingið leiðara. Leiðarin skal eisini verða leiðari á Sosialu deild á Tvøroyri**

STARVSSETING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er eisini leiðari settur fyri tað nýstovnaðu sosialu deild á Tvøroyri.

Tað er Susanne Madsen er sett í nýgja leiðarastarvið.

Ætlanin er, at hon skal verða leiðari á Sosialu Deild á Tvøroyri hálva tíð, men hon hálva tíð skal hon eisini verða leiðari fyri nýggju barnaverndarumsitingini hjá kommununum í Suðuroynni.

Men hesar fyrstu mánaðirnar verður tað tó barnaverndarumsitingin, sum verður høvuðsuppgáva hennara.

Susanne Madsen er dani, hon er 30 ára gomul og cand mag í samfelagsfrøði/fyrisiting og søgu. Hon hevur áður undirvíst á miðnámsskúlanum í Suðuroy og á donskum miðnámsskúla. Hon hevur eisini arbeitt á almannastovu í Danmark og á Granskingardeplinum fyri økismenning. Í løtuni er hon lærari á studentaskúla í Danmark.

Tað gekk ikki so lætt at seta starvið, tí tá ið lýst varð í fyrsta umfari, var bara ein skikkaður umsøkjari. Tí varð gjørt av at søkja av nýggjum og tá bar betur til við tað, at tá søktu átta fólk.

Jens Johannesen, formaður í sosialu nevnd hjá Tvøroyrar Býráð, sigur, at í næstum verður lýst eftir einum starvsfólki aftrat.

Kommunurnar í Suðuroynni hava skipað eina felags barnavenrd og tær eru eisini samdar um at arbeiða fyri at stovna eina felags sosiala deild fyri alla Suðuroy.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við